# eitt konsept




positiv mótvegis tónleikinum. Meðan Eivør sigur seg verða bilsna av móttøkuni, sigur Nikolaj, at hann slett ikki er tað. Hann hevur ongantíð verið í iva um, at hetta fór at rigga heilt væl. Hann heldur, at Eivør er so ótrúliga eksotisk, og at hetta er ófatiliga spennandi fyri ein »almindelig leverpostejs dansker«, sum hann málber seg. Hetta gevur áhoyrarunum ein stóran kontrast til tað, sum vit eru von við at hoyra úr teimum amerikonsku miðlunum. Tí tónleikurin hjá Eivør er úr einum umhvørvi, sum bara er til í norðurlondum. Tí gevur tað tí danska áhoyrarunum samband við sínar norðurlendsku røtur, og úrslitið er ein innilig og fantastisk tónleikaupplivíng. Og hesin tónleikurin er eisini við til at styrkja um okkara fatan av okkum sjálvum, sigur ein hugsanarsamur Nikolaj Bentzon, hóast Eivør vísur á, at hon aldri sjálv hevur hugsað soleiðis um hennara tónleik.

### Framtíðin

Mánadagin endar konsertferðin hjá DR Big Band & Eivør Pálsdóttir. Men Eivør fer ikki at taka sær av løttum fyri tað. Komandi mánaðirnar hevur Eivør nokk at takast við. Hon fer beina leið til Íslands, har hon skal undirvísa í einum skúla. Eisini hevur hon eitt stórt kór har, sum hon skal ferðast við. Tey skulu halda nakrar jólakonsertir, og hon sigur, at tíanverri fáa føroyingar ikki høvi at hoyra konsertirnar her á klettunum. Í Føroyum plaga vit at verða so heppin, at Eivør Pálsdóttir heldur nakrar jólakonsertir her heima. Men tað er ikki vist, at so verður í ár. Men hon lovar næstan, at hon fer at gera okkurt hugnaligt, sum vit sleppa at hoyra um jóltíðir. Eivør sigur at enda, at henni ikki dámar so væl at tilrættisleggja alt ov langt inn í framtíðina. Hóast tað veit hon, at hon skal spæla nakrar konsertir í Danmark í februar, og so skal hon eisini til Kanada í mars at spæla tónleik.

Næst á skránni hjá Danish Radio Big Band er ein konsertferð við sangarinum Anders Blikfeldt, sum vit kenna úr kenda bólkinum »Big Fat Snake«, og tað verður so heilt vist øðrvísi tónleikur enn tann sum big bandið hevur spælt saman við Eivør.

## Eivør hugtók og gandaði

**Á konsertini í Læraraskúlahøllini hóskvøldið hugtók og gandaði Eivør Pálsdóttir áhoyrararnar inn í sín egna heim. Tú kundi snøgt sagt ikki lata vera við at sveima við henni. Á pallinum var hon sannførandi og trygg, og hetta gjørdi, at báðir tímarnir fuku fram við**

KONSERT

*Rókur Jákupsson Jakobsen*

Um tú tekur eitt frálíkt big band og blandar tað saman við einum av heimsins bestu songfuglum, so burdi útlitini verið til staðar fyri einari góðari konsert. Og soleiðis bleiv tað eisini, tá ið Danish Radio Big Band og Eivør Pálsdóttir hildu konsert í Læraraskúlahøllini hóskvøldið klokkan 20.

Til ein fullsetta sal vóru vit vitni til eina heilt serliga konsert í Læraraskúlahøllini. Umleið 350 fólk vóru so heppin at fáa atgongumerki til hesa forkunnugu konsertina, og hesi fólkini fóru ikki vónbrotin til hús. Konsertin var sera góð, og tað sum kanska yvirraskaði mest var, at høllin á Læraraskúlanum riggaði framúr væl til tiltakið.

Hóast Danish Radio Big Band telur einar 20 mans var tað ongin trupulleiki hjá teimum at finna seg til rættis á lítla pallinum í Læraraskúlanum. Og ljóðið var eisini ótrúliga klárt og gott, soleiðis at ein fór at undrast á, at høllin ikki oftari verður nýtt til stórar konsertir.

Í smáar tveir tímar hugtók og gandaði Eivør Pálsdóttir áhoyrararnar inn í sín egna heim. Tú kundi snøgt sagt ikki lata vera við at sveima við henni. Á pallinum var hon sannførandi og trygg, og hetta gjørdi, at báðir tímarnir fuku fram við. Løgini vóru næstan spæld út í eitt, men konsertin kendist als ikki ov drúgv fyri tað.

At hoyra eitt so gott big band sum Danish Radio Big Band er sjáldsamt oyrakrás á okkara leiðum. Men teir vístu, hví teir hava nátt teirra virðiligu støðu. Tað svingaði so væl, at áhoyrarin ikki kundi lata vera við at trampa afturvið tónleikinum. Tónleikurin smeltaði saman til okkurt heilt serligt, og vit kunnu longu nú byrja at gleða okkum til at hoyra næsta útspælið hjá Eivør Pálsdóttir.

Ummæli av konsertini verður at lesa í blaðnum týsdagin.



*Í smáar tveir tímar hugtók og gandaði Eivør Pálsdóttir áhoyrararnir inn í sín egna heim í Læraraskúlahøllini hóskvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*